Leiðbeining til lærarar

Týskt

framhaldsmál – A-stig

Krøvini til lærugreinina týskt framhaldsmál A-stig eru ásett í námsætlanini í týskum og í støðisnámsætlanini. Í hesi leiðbeiningini eru frágreiðingar um nøkur av hesum settu krøvum. Sitat úr galdandi námsætlanum eru markað við skákskrift.

Tilhoyrandi skjøl

- Námsætlan – Týskt 8-A
- Støðisnámsætlan
- Leistur – eftirmeting og afturboðan
- Leistur – lestrarætlan fyri lærugrein
- Leistur – undirvísingargongd

Innihaldsyvirlit

1. Kjarnaøki 3
1.1. Talaða málið 3
1.2. Skrivaða málið 4
1.3. Málkunnleiki 4
1.4. Mentan og samfelag 5
2. Førleikamál 5
2.1. Faklig førleikamál – lurtifatan 6
2.2. Faklig førleikamál – lesifatan 6
2.3. Faklig førleikamál – taluførleikar 7
2.4. Faklig førleikamál – skriviførleikar 8
2.5. Faklig førleikamál – málfatan 8
2.6. Faklig førleikamál – mentanarfatan 9
3. Eftirmeting og próvtøka 9
3.1. Eftirmeting og afturboðan 9
3.2. Støðumet, ársmet og royndarmet 10
3.3. Skrivlig próvtøka á A-stigi - framhaldsmál 10
3.3.1. Dømingargrundarlag – skrivlig próvtøka 10
3.3.2. Próvtalslýsing – skrivlig próvtøka 12
3.4. Munnlig próvtøka á A-stigi – framhaldsmál 12
3.4.1. Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka 15
3.4.2. Próvtalslýsing – munnlig próvtøka 15
4. Ársætlan og undirvísingargongdir 16

1. Kjarnaøki

Týskt á A-stigi – framhaldsmál hevur fýra ymisk kjarnaøki. Økini umskarast og virka fyri ein stóran part saman í undirvísingini

- *Talaða málið*
- *Skrivaða málið*
- *Málkunnleiki*
- *Mentan og samfelag*

Týskt C-A

Kjarnaøkini umskarast, soleiðis at skilja, at flestu tekstir og arbeiðshættir hava eyðkenni frá meira enn einum kjarnaøki. Tískil verður fyri tað mesta arbeitt á fleiri kjarnaøkjum samstundis, hóast denturin kann liggja á ávísum kjarnaøki.

Mælt verður til, at næmingarnir í týskum framhaldsmáli A til samans lesa tað, sum svarar til umleið 300-400 síður av ástøði og tekstum, herímillum eisini marghátttaðum tekstum, t.e. umleið 100-150 síður um árið. Síðutalið er leiðbeinandi, soleiðis at skilja, at tað ikki er ætlanin, at lærarar skulu telja allar síður og uppgeva síðutøl í undirvísingarfrágreiðingunum. Síðutalið er í sjálvum sær ikki avgerandi fyri, hvussu nógv tíð verður brúkt til undirvísing og arbeiði við ymsu tekstunum, og rúm skal eisini vera fyri at arbeiða við marghátttaðum tekstum, sum ikki hava síðutøl.

Arbeitt kann vera við umleið 5-8 høvuðsevnum, t.d. byrja við gerandisevnum sum: kærleiki, familja, ungdómur, ævintýr og síðan fara yvir í evni, sum eru meira ítøkilig fyri lærugreinina, t.d.: romantikkur, DDR, nasisma, migrantbókmentir o.s.fr.

1.1. Talaða málið

Kjarnaøkið talaða málið snýr seg í týskum um, at næmingurin mennir sínar samskiftisførleikar í týskum. Hetta kjarnaøkið fevnir tí um at lurta, tosa og leggja fram í ymiskum felagsligum høpi. Í undirvísingini skal tí hugt verða at ymiskum samskiftissnildum og ymiskum lurti- og taliháttum. Umráðandi er, at tosað verður á týskum máli í størst møguligan mun í undirvísingini.

Týskt C-A

Serliga í byrjanini eigur høvuðsdentur at verða lagdur á kommunikativa partin, har næmingarnir fáa møguleika at ogna sær týsk orð og hugtøk, sum stuðla undir virkisføri, t.e. funktionalitet. Mál er altíð samskifti, og mál hevur altíð eina funksjón í menniskjaligum sambondum. Við at arbeiða við innihaldi, sum er viðkomandi fyri næmingarnar, ber til at skapa ein kommunikativan tørv hjá næmingunum, soleiðis at tey verða motiverað til at luttaka í samskifti um eitt ávíst evni.

Grundfatanin í hesi kommunikativu tilgongdini er, at ein lærir at samskifta við at samskifta; samskifti er sostatt um somu leið bæði førleikamál og amboð í undirvísingini.

1.2. Skrivaða málið

Kjarnaøkið skrivaða málið snýr seg um, at næmingurin mennir sínar lesi- og skriviførleikar í týskum. Hetta kjarnaøkið fevnir um at lesa, fata og skriva við støði í ymiskum tekstsløgum úr týskmæltum økjum. Í hesum sambandi verður arbeitt við ymiskum lurti- og lesiháttum og hóskandi hjálparmiðlum. Kjarnaøkið skrivaða málið snýr seg sostatt eisini um stigvíst at víðka um orðfeingið, umframt viðgerð av tekstum, og er á tann hátt eisini við til at stuðla upp undir talaða málið.

Týskt C-A

Fyri at røkka teimum fakligu førleikamálunum, sum eru sett í lærugreinini, skulu næmingarnir arbeiða við einum fjølbroyttum úrvali av ótillagaðum týskmæltum fiktivum og ikki-fiktivum tekstsløgum, sum snúgva seg um týðandi mentanar-, søgu- og samfelagsviðurskifti í Týsklandi, bæði fyri og eftir 1945. Harumframt skal teksttilfar um viðurskifti í týskmæltum londum uttan fyri Týskland verða tikið við.

Í námsætlanini er krav um, at tekstirnir eru ótillagaðir, t.e. at ongar broytingar verða gjørdar í tekstinum við tí endamáli at broyta torleikastigið. Tekstir kunnu tó verða gloseraðir, og teir kunnu eisini verða nýttir í úrdragi, um hetta verður gjørt greitt.

Støði verður tikið í víðkaða teksthugtakinum, t.e.:

Víðkað teksthugtak

"Tekstur er ein og hvør frásøgn ella samanhangandi sekvensur, ið er tongdur at einum ávísum øki, og sum í arbeiðinum við eini uppgávu gevur høvi til málsligt virksemi" (umsett úr Den Fælles Europæiske Referenceramme for Sprog (CEFR)).

Við teksti verður sostatt meinað við eina rød av tekstsløgum og miðlum: skrivað og talgilt; visuelt og auditivt. Undirvísingin eigur tí ikki einans at byggja á skrivaðan tekst, men fevna um eitt breitt úrval av analogum og talgildum tekstum, herímillum eisini filmsbrot, ljóðbrot og myndir.

Skrivliga arbeiðið eigur at skipast soleiðis, at avrikini avspegla torleikastigið í undirvísingini hvat viðvíkur longd, máli og innihaldi. Á henda hátt er ein natúrlig progressión í skrivliga arbeiðinum.

1.3. Málkunnleiki

Kjarnaøkið málkunnleiki snýr seg um, at næmingurin gjøgnum tekstir og samskifti fær innlit í og lærir seg grundleggjandi týskar ljóðreglur, bendingar og setningsbygnað, umframt at komið verður inn á semantikk í fremmandamálsligum høpi. Grundleggjandi kunnleiki til ein málbygnað styrkir samskiftisførleikan og mennir málfatan næminganna sum heild.

Undirvísingin í mállæru eigur í størstan mun at verða tongd at arbeiðinum við øðrum partum av undirvísingini, til dømis tekstlesnaði og munnligum og skrivligum samskifti, soleiðis at næmingarnir læra mállæru í veruligum samanhangum og støðum, har málið verður nýtt í verki.

Málkunnleiki snýr seg eisini um, at næmingarnir verða tilvitaðir um egnan læringartørv, og hvussu ymiskar snildir og amboð kunnu vera við til at menna tann partin av týska málinum, sum næmingurin hevur tørv á at styrkja. Tað kunnu vera snildir sum t.d. lurti-, lesi- og samskiftissnildir, ella við at vísa á tilfar, filmar/seriur, fremmandamálsforrit, tónleik og annað, har næmingarnir sjálvir kunnu menna týska málið.

1.4. Mentan og samfelag

Kjarnaøkið mentan og samfelag snýr seg um, at næmingurin fær eina tilvitaða fatan av mentan og samfelagi í londunum, har týskt er høvuðsmál. Í hesum kjarnaøki verður sostatt arbeitt við hóskandi evnum, sum eyðkenna mentan og samfelag í týskmæltum londum og økjum. Undirvíst verður tí í einum breiðum úrvali av tekstum á ymiskum torleikastigum frá nýggjari og eldri tíð um almenn, mentanarlig og samfelagslig evni. Týðandi mentanarlig og samfelagslig viðurskifti í týskum máløkjum verða tikin við upp í undirvísingina.

Týskt C-A

Undirvísingin eigur at byggja á eitt breitt mentanarhugtak. Tað vil siga, at næmingarnir gjøgnum undirvísingina skulu fáa innlit í, at har finst ikki *ein* homogen týskmælt mentan, men at talan er um mentanarligt fjølbroytni og ymiskleika. Eitt nú kann arbeitt verða við evnunum *Gastarbeiter*/*multikulturelles Deutschland* ella ymiskleika í hugburði til egna søgu og mentan.

Við at menna fremmandamálsførleika næminganna og teirra kunnleika til onnur lond hevur undirvísingin í fremmandamáli ein miðsavnandi leiklut í menningini av tvørmentanarligum førleikum.

Ein breið fatan av mentanini hjá øðrum, eins væl og egnari mentan, verður ment gjøgnum fremmandamálið, herímillum gjøgnum eitt fjølbroytt úrval av evnum og týskmæltum tekstum, sum snúgva seg um mentanarligar, søguligar og samfelagsligar umstøður í týskmæltum økjum.

2. Førleikamál

Fakligu førleikamálini eru orðað eftir besta próvtali, soleiðis at skilja, at um næmingurin hevur ognað sær førleikamálini væl og virðiliga, fær næmingurin próvtalið 12. Eins og kjarnaøkini umskarast ymsu fakligu førleikamálini, og í flestu førum verður arbeitt við fleiri førleikamálum samstundis.

Førleikarnir verða ognaðir gjøgnum undirvísingarevnini í kjarnaøkjunum umframt við fjølbroyttum arbeiðsháttum og samspæli við aðrar lærugreinir, tá ið tað ber til. Tí er umráðandi, at hugsað verður um fakligu førleikamálini saman við innihaldinum og arbeiðsháttunum, tá ið undirvísingin verður skipað.

Fakligu førleikamálini í týskum kunnu flokkast í seks yvirskipað fremmandamálslig førleikaøki:

1. **Lurtifatan**
2. **Lesifatan**
3. **Taluførleikar**
4. **Skriviførleikar**
5. **Málfatan**
6. **Mentanarfatan**

Førleikarnir í týskum framhaldsmáli A svara til B2 í evropeiska CEFR-stiganum. CEFR-stigin (Common European Framework of Reference for Languages) er ein skipan til at lýsa og meta um málførleikar. CEFR-stigaskipanin varð ment av Evroparáðnum við tí endamáli at skapa eina felags evropeiska skipan til málundirvísing, læring og eftirmeting.

Stigaskipanin er býtt sundur í seks stig: A1 og A2 (grundstig), B1 og B2 (ávegis), og C1 og C2 (væl ávegis).

2.1. Faklig førleikamál – lurtifatan

- *at lurta eftir og skilja talað týskt mál um kend evni, miðlað gjøgnum ymiskar miðlar*

Týskt A - framhaldsmál

Førleikin at lurta verður støðugt mentur í undirvísingini við samrøðum í flokkinum, men eisini gjøgnum miðvísar venjingar, har ymiskir mátar at lurta verða vandir, t.d. at lurta eftir einum ljóðbroti og finna ávísar upplýsingar. Á tann hátt stuðlar arbeiðið við lurtifatan eisini kravinum um at nýta víðkaða teksthugtakið, umframt at tílíkar venjingar eru ein kelda til autentiskt og aktuelt týskt mál. Umráðandi er, at næmingarnir hoyra týskt mál í undirvísingini, t.d. við at undirvísarin tosar týskt við tey.

Arbeiðið við lurtifatan kann við fyrimuni verða knýtt at arbeiðinum við orðfeingi, eins og arbeiðinum við munnliga og skrivliga partinum, t.d. at tey lurta eftir onkrum, fyri síðan at svara onkrum spurningum munnliga/skrivliga. Á tann hátt fær ein næmingarnar at lurta meira aktivt.

2.2. Faklig førleikamál – lesifatan

- *at lesa og skilja ymisk sløg av ótillagaðum gomlum og nýggjari týskum tekstum úr ymiskum tekstsløgum*

Í arbeiðinum við tekstunum skal dentur verða lagdur á orðfeingi í tematiskum og evnisbundnum samanhangum. Fyri at kunna lesa og skilja tekstir er tað grundleggjandi at kenna eina ávísa mongd av orðum. Tí er arbeiði/venjing við orðfeingi ein fortreyt. Afturat hesum er viðkomandi at arbeiða við nøkrum lesisnildum. Her kann arbeiðið verða býtt sundur í áðrenn lesing, lesing og aftan á lesing:

- Áðrenn lesing: tosa um slag av teksti, grundleggjandi orðfeingið í tekstinum og forfatan av evninum
- Undir lesing: lesa virkið við at seta spurningar, notera og kanna ókend orð
- Aftan á lesing: arbeiða við lisna tekstinum, t.e. m.a. at kjakast um innihaldið, umseta brot ella gera stuttan samandrátt.

Í undirvísingini skulu næmingarnir fáa kunnleika til ymisk tekstsløg. Í lærugreinini verður víðkaða teksthugtakið nýtt, sum setur krøv um, at ymiskir miðlar verða nýttir í undirvísingini (sí brot 1.2. á s. 4).

Í námsætlanini er krav um, at tekstirnir eru ótillagaðir, t.e. at ongar broytingar verða gjørdar í tekstinum við tí endamáli at broyta torleikastigið. Tekstir kunnu tó verða gloseraðir, og teir kunnu eisini verða nýttir í úrdragi, um hetta verður gjørt greitt.

2.3. Faklig førleikamál – taluførleikar

- *at taka virknan lut í samskifti og kjaki og greiða frá ymsum sjónarmiðum á týðiligum, samanhangandi og fjølbroyttum týskum*
- *at leggja fram á týskum um kend evni og týskar tekstir, herímillum at viðgera hesar og samanbera við aðrar tekstir við breiðum orðfeingi og nøkulunda rættum týskum máli og tónalagi*

Týskt A - framhaldsmál

Taluførleikin kann verða vandur í pararbeiði ella í smærri bólkum. Slíkt virksemi er væl egnað til at venja evnini hjá næmingunum at seta orð á hugsanir og meiningar á týskum, argumentera fyri sjónarmiðum og byggja upp eina samanhangandi samrøðu.

Munnliga prógvtøkan tekur støði í ókendum teksti. Tað er tí eitt gott hugskot eisini at arbeiða ítøkiliga við fríum og spontanum samskifti. Næmingarnir kunnu til dømis svara ókendum spurningum til ein lisnan tekst ella gera smáar samrøður (interviews) við hvønn annan, har tey ikki kenna spurningarnar frammanundan. Viðkomandi er eisini at nýta parafrasering/umorðing sum amboð.

Umráðandi er, at næmingarnir allatíðina venja úttalu og intonatión. Úttaluvenjing er ein natúrligur partur av fleiri av fakligu førleikaøkjunum, serliga í upplestri og samrøðu.

Fyri at lyfta samskiftið upp á A-stig, kunnu næmingarnir arbeiða við sjálvstøðugum framløgum, har tey greiða frá antin persónligum, fakligum ella samfelagsligum viðurskiftum og seta í frásjón.

2.4. Faklig førleikamál – skriviførleikar

- *at orða seg greitt og samanhangandi á skrivligum týskum við breiðum orðfeingi og nøkulunda rættum týskum*

Týskt A - framhaldsmál

Skriving sum arbeiðsháttur hevur stóran týdning fyri máltøku, tí hon mennir málsliga tilvitan, og hetta fremur lesiførleika, tekstfatan og taluførleikar. Í skrivitilgongdini hava luttakararnir tíð at gera sær ómak og hugsa um bendingar o.tíl. og menna á tann hátt fatanina av málbygnaðinum og mállæruna.

Á A-stigi er talan um at skriva um ítøkiligar tekstir við at nýta viðkomandi greiningaramboð og endurgeva úr tekstinum.

Í undirvísingini í týskum framhaldsmáli á A-stigi er umráðandi, at skrivligi parturin hevur ein týðandi leiklut, tí skeiðið endar við skrivligari prógvtøku (um lærugreinin verður trekt). Málið er at gera næmingarnar førar fyri at orða seg skrivliga á týskum við einum breiðum orðfeingi og við tryggleika í ortografi, morfologi og syntaksi. "... nøkulunda rættum týskum" er galdandi í parti 5 í skrivligu prógvtøkuni, har næmingarnir skulu orða seg frítt á týskum.

Skrivliga prógvtøkan metir skriviførleika, lesiførleika, tekstfatan og málsligu vitan næminganna.

2.5. Faklig førleikamál – málfatan

- *at nýta orðabøkur og viðkomandi mállærubøkur*
- *at greina og lýsa týska mállæru og setningsbygnað á føroyskum máli*
- *at seta týskt í samband við føroyskt og onnur mál og nýta millummálsligu vitanina til at menna málið*

Týskt A - framhaldsmál

Endamálið við hesum førleikamálum er at hjálpa næmingunum at síggja mállæru og málbygnað sum eitt amboð til at skilja og brúka týskt mál. Næmingarnir læra at brúka tvímálsligar orðalistar, at avkoda upplýsingar og styttingar í orðabókum og nýta mállæruyvirlit sum arbeiðsamboð, so at tey gerast meira sjálvstøðug í arbeiðinum við málinum.

Setningsgreining snýr seg um at læra at greina setningar við at áseta orðaflokkar og setningsliðir. Miðað verður ímóti at næmingarnir duga at nýta føroysk og latínsk mállæruheiti. Í sambandi við at setningsgreining verður vand, er viðkomandi at tosa um orðarað.

Millummálslig vitan ella málslig undanvitan er bæði tann málsligi førningur, næmingarnir hava við sær úr øðrum máli/málum, og tann vitan, tey hava ognað sær í týskum fram til nú. Næmingarnir eiga at verða stuðlaðir í at nýta alt sítt málsliga tilfeingi til at styrkja sínar samskiftisførleikar, lesifatan og

skriviførleikar. Hetta snýr seg um at gera næmingarnar varugar við og tilvitaðar um millummálslig mynstur og málsliga metahugsan, sum kann gera tað bæði lættari og stuttligari at læra eitt nýtt mál.

2.6. Faklig førleikamál – mentanarfatan

- *at skilja sosialar atferðarreglur í týskmæltum økjum*
- *at greiða frá á týskum um týdningarmiklar, útvaldar síður av mentan, søgu og samfelagsviðurskiftum í týskmæltum økjum*

Týskt A - framhaldsmál

Undirvísingin kann leggja upp til eitt millummentanarligt samskifti um kropsmál og málburð, tað vil siga bæði nonverbalar og verbalar normar. Í sambandi við kropsmál er viðkomandi at koma inn á ymsar normar viðvíkjandi eygnasambandi, gestikulering og frástøðu millum fólk í samskifti. Í sambandi við normar fyri málburð er viðkomandi at tosa um formligt/óformligt mál, máliskur og orðatøk og kurteisi, t.e. normar fyri virðiligt samskifti.

Arbeitt verður við tekstum, dialogum, myndum og filmum, sum lýsa gerandisdag, mentan og samfelagslig viðurskifti í týskmæltum londum. Næmingarnir verða eggjaðir til at samanbera við egna mentan og at orða seg á týskum um ymiskt í hesum sambandi. Hetta styrkir bæði mentanarfatanina og førleikan at brúka týskt mál í meiningsfullum samanhangi.

3. Eftirmeting og prógvtøka

3.1. Eftirmeting og afturboðan

Aðalmálið við allari undirvísing í øllum skúlaverkinum er, at allir næmingar áhaldandi læra og mennast, og tí eru reglulig eftirmeting og afturboðan um úrtøku og menning næminganna sameindur partur av allari undirvísing í øllum lærugreinum og á øllum stigum í skúlaverkinum.

Støðisnámsætlan

Næmingarnir skulu javnan fáa afturboðan og leiðbeining í sínum arbeiði. Hetta kann eitt nú gerast við javnan at vísa á førleikamálini og at vísa á hóskandi hjálparmiðlar og arbeiðshættir, sum næmingarnir kunnu fáa gagn av. Afturboðanin kann vera munnlig ella skrivlig. Víst verður til leiðbeinandi skjalið "Leistur – eftirmeting og afturboðan", sum lærarar kunnu styðja seg til.

Umráðandi er, at lærarin leggur undirvísingina soleiðis til rættis, at næmingarnir fáa bestu fortreytir at læra. Tískil eiga undirvísingargongdir altíð at eftirmetast við tí fyri eyga at betra um undirvísingina.

Víst verður til skjalið "Leistur – undirvísingargongd".

3.2. Støðumet, ársmet og royndarmet

Næmingarnir skulu gjøgnum skúlaárið hava støðumet og ársmet eftir galdandi prógvtalsstiga. Vanliga fáa næmingarnir støðumet fyri jólafrítíðina og fyri páskafrítíðina og so ársmet við skúlaárslok. Í sambandi við royndir skulu næmingarnir eisini hava royndarmet.

Metini verða givin við støði í fakligu førleikamálunum og støðisførleikunum. Støðu- og ársmetini eru sostatt meting lærarans av, í hvønn mun næmingarnir í framdum avrikum lúka sett førleikamál, samanborið við framda undirvísing. Royndarmetini verða givin við støði í ávísum uppgávuorðingum.

Støðu- og ársmetini skulu lýsa fakliga støðið í løtuni, tá ið metini verða givin. Talan eigur sostatt ikki at vera um eina meting yvir eitt longri tíðarskeið ella eitt miðal av fleiri avrikum.

Atburður, uppmøting og arbeiðssemi eiga í sjálvum sær ikki at vera tikin við í støðu- og ársmetini.

Ársmetini triðja árið eru endalig og verða sett í prógv næminganna.

3.3. Skrivlig prógvtøka á A-stigi - framhaldsmál

Skrivliga prógvtøkan varir 5 tímar, og uppgávurnar í prógvtøkuraðnum verða settar innan fyri kjarnaøkini í lærugreinini.

Skrivliga prógvtøkan er tvíbýtt:

1. *Fleiri smáar uppgávur um ein týskan tekst. Eingir hjálparmiðlar eru loyvdir. Uppgávan er í pappírsformi, og svarast skal við hond. Hesin parturin av prógvtøkuni kann í mesta lagi vara 1½ tíma.*
2. *Prógvtakarin skal skrivliga á týskum viðgera týskar tekstir. Einans sentralt ásettir hjálparmiðlar eru loyvdir. Uppgávan er í pappírsformi, og svarast skal við hond. Hesin parturin av prógvtøkuni byrjar, tá fyrri parturin er innlatin.*

Týskt A - framhaldsmál

Skrivliga prógvtøkan er júst dagførd sambært nýggju skrivligu prógvtøkuni í Danmark. Hesin parturin av leiðbeiðbeiningini verður tí dagførdur í næstum.

3.3.1. Dømingargrundarlag – skrivlig prógvtøka

Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun prógvtakarin lýkur fakligu málini, sum eru sett í lærugreinini. Dentur verður lagdur á, at prógvtakarin dugir at taka týdningarmestu tættirnar burtur úr tekstatilfarinum, at orða seg skrivliga á týskum og at skipa og leggja fram eitt innihald. Prógvtakarin skal harumframt vera stinnur í formlæru og orðalagslæru og hava tamarhald á almennum orðatilfari og merkingarlæru.

Givið verður eitt prótal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki prótakarans.

Fyri at svarið skal vera nøktandi, skulu prótakararnir fyrst og fremst við viðgerðini av tí, sum uppgávuorðingin krevur, vísa, at tey hava skilt høvuðsinnihaldið í tekstinum. Um tey síðan eru før fyri t.d. at seta tekstin í frásjón ella at leggja fram egin sjónarmið, kann hetta – alt eftir dygd – verða mett jaliga.

Svarið verður tó ikki mett sum ein tulkingaruppgáva, heldur ikki tá ið teksturin hevur skaldskaparligt eyðkenni. Eru misskiljingar av avgerandi boðskapinum í tekstinum, verður hetta mett neiliga.

Uppgávusvarið skal vera greitt skipað. Svarið skal ikki neyðturviliga fylgja tekstbygnaðinum, men skal verða lagt fram í logiskari og skipaðari røð, uttan órógvandi lop og óneyðugar endurtøkur. Til eitt gott svar hoyrir harumframt ein greiður munur á tí, sum er týðandi, og tí, sum er minni týðandi.

Í uppgávum 5.1 og 5.2 verður dentur lagdur á egna málframleiðslu hjá prótakaranum, soleiðis at t.d. setningar og tekstbrot, sum eru beinleiðis kopierað úr annaðhvørt tekstinum ella uppgávum 1–4, verða mett neiliga í samlaðu metingini.

Í einum breiðum máli sum týskum er vandi fyri skeivleika í metingini av, hvussu rætt málið í uppgávusvarinum er. Fyri at mótvirka hesum er týdningarmikið at skilja millum tvey sløg av málsligum fyribrigdum:

1. Málslig fyribrigdi, sum eru avgerandi fyri eina greiða og ótarnaða fatan av tí skrivaða. Her kunnu, millum fleiri møgulig dømi, nevnast: greið marking av grundliði og ávirki, samsvar (kongruensur) millum grundlið og umsøgn, orðarað, gjøgnumskygni í genitivsambondum, modalitetur og kasus í sambandi við mest nýttu fyrisetingarnar við dupultari stýring.

2. Málslig fyribrigdi, sum hava minni týdning. Her kunnu somuleiðis, millum fleiri møgulig dømi, nevnast: kyn og tal hjá navnorðum, sum koma fyri sjáldan, partar av bendingum av lýsingarorðum, í ávísum førum kasus í sambandi við fyrisetingar við einkultari stýring og sagnorð, har kasus ikki sæst beinleiðis í setningsgreiningini, umframt stavsetingarligir smálutir.

   Talið á villum einsamalt er ikki avgerandi fyri metingina av dygdini í einum svari, men má síggjast í samanhangi við innihaldsliga haldgóðsku og fyllu, herímillum hvussu sjálvstøðug málframleiðslan hjá prótakaranum er og slagið av villum. Villur innan fyri eitt avmarkað øki mugu metast sum minni týðandi enn villur, sum geva ábendingar um víðfevnda málsliga óvissu.

At svarið er langt, er ikki í sjálvum sær ein fyrimunur. Vavi á uppgávum 5.1 og 5.2 er tilsamans umleið 400 orð uttan sitat. Svarið til uppgávu 5.1 fyllir av natúrligum orsøkum meira enn svarið til uppgávu 5.2, tí í uppgávu 5.1 skal ein koma runt í øllum punktum í uppgávuni. Eitt hóskandi tilmæli er umleið 250-300 orð til uppgávu 5.1 og umleið 100-150 orð til 5.2.

3.3.2. Prótvalslýsing – skrivlig prótvøka

Prótval	Heiti	Lýsing
12	Framúr gott	Skrivliga framsetingin er samanhangandi og við einum breiðum orðfeingi. Prótvakarin megnar væl at nýta viðkomandi idiomatikk, morfologi og syntaks við fáum, ótýðandi villum. Innihaldsliga vísir prótvakarin, at hann/hon hevur skilt teksttilfarið væl og dugir at viðgera evnið sjálvstøðugt og taka upp í viðgerðina nærum allar viðkomandi tættir, sum uppgávan leggur upp til.
7	Gott	Skrivliga framsetingin er nøkulunda samanhangandi. Prótvakarin megnar rímiliga væl at nýta viðkomandi orðfeingi, idiomatikk, morfologi og syntaks. Nakrar villur eru, sum tó ikki órógva samskiftið. Innihaldsliga vísir prótvakarin sum heild, at hann/hon hevur skilt teksttilfarið og dugir at viðgera evnið sjálvstøðugt og taka upp í viðgerðina nógvar, men ikki allar viðkomandi tættir, sum uppgávan leggur upp til.
02	Nøktandi	Skrivliga framsetingin er rættiliga ósamanhangandi, men sum heild til at skilja. Málið er óneyvt, og fleiri týðandi villur eru. Innihaldsliga vísir prótvakarin sum heild, at hann/hon hevur skilt høvuðsinnihaldið í teksttilfarinum og megnar at taka uppí viðkomandi tættir, sum uppgávan leggur upp til, í nøktandi vavi.

3.4. Munnlig prótvøka á A-stigi – framhaldsmál

Próvhoyringin varir 30 minuttir, íroknað prógvdøming. Fyrireikingartíðin er 60 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.

Próvhoyrt verður í ókendum tilfari, og tilfarið skal vera valt soleiðis, at tað í tema ella á annan hátt er knýtt at evnum, sum arbeitt hevur verið við í undirvísingini. Mynd kann vera partur av tilfarinum. Orðafrágreiðingar kunnu vera til serliga trupul orð. Prótvøkuspurningurin skal byrja við stuttari leiðbeining á týskum um, hvussu prótvakarin skal arbeiða við tilfarinum.

Munnliga prótvøkan er tvíbýtt:

1. *Við støði í einum ókendum teksti á umleið 1½-2 normalsíður skal næmingurin lesa eitt brot upp á týskum. Brotið skal fevna um umleið 70 orð. Prótvakarin skal greitt fáa at vita, hvønn part talan er um. Próvhoyrarin setir hereftir spurningar á føroyskum til málslig og/ella innihaldslig viðurskifti, ið skulu lýsa prótvakarans fatan av teksti og málbygnaði.*

2. *Síðani er ein samrøða á týskum millum prógvtakara og prógvhoyrara um útflýggjaða tekstin, sum eisini verður settur í samband við viðgjørd evni. Prógvtakarin innleiðir samrøðuna við eini stuttari framløgu á týskum um tekstin og evnið.*

Allir hjálparmiðlar eru loyvdir, tó ikki umsetingarforrit, sum kunnu umseta heilar setningar úr einum máli í annað. Loyvt er heldur ikki at nýta vitlíki.

Ein normalsíða er 2400 tekn, íroknað millumrúm.

Sami prógvtøkuspurningur kann í mesta lagi verða nýttur tvær ferðir í sama flokki/bólki.

Týskt A - framhaldsmál

Ókendi teksturin skal ikki stava frá einum verki, sum er lisið í síni heild ella í brotum í undirvísingini, men kann til dømis vera eitt brot úr einum øðrum teksti eftir sama høvund. Tekstir úr antologium verða fataðir sum sjálvstøðugir tekstir og kunnu tí verða nýttir.

Teksturin skal vera ótillagaður, t.e. at ongar broytingar verða gjørdar í tekstinum við tí endamáli at broyta torleikastigið. Umráðandi er, at tekstirnir eru eins viðvíkjandi torleikastigi, soleiðis at næmingarnir eru javnsettir. Lættari tekstir (t.d. úr glosseraðum lærubókum) kunnu tí hava sera fáar glosur, meðan torførari tekstir (t.d. greinar av netinum) kunnu hava fleiri glosur. Tekstirnir skulu sostatt glosserast í tann mun, at tað tekur sama næmingi eins langa tíð at lesa allar tekstirnar.

Saman við ókenda tekstinum skulu kelduávísingar verða upplýstar. Reglutøl skulu vera ásett, og upplýst verður, hvat evni, teksturin hevur tilknýti til. Evnini, sum eru grundarlag undir prógvtøkuni, skulu í sínari heild fevna um fakligu førleikamálini og kjarnaøkini, sum er sett í lærugreinini. Næmingarnir skulu vita framman undan, hvørji evni verða partur av prógvtøkuni.

Vavið á teksttilfarinum er uml. 1,5–2 normalsíður. Áleiðis ásetingin loyvir, at ein víkur smávegis frá hesum – er teksturin styttri enn 1,5 normalsíðu, kann frávikið í mesta lagi vera 5 %. Um teksturin fer upp um 2 normalsíður, skal hetta einans vera fyri at enda ein setning. Mynd kann vera partur av prógvtøkutilfarinum. Um myndin er partur av leiðbeinandi spurningunum, og næmingurin skal taka hana við í viðgerðina, telur hon umleið ¼ av prógvtøkutilfarinum. Um tað stendur næminginum frítt at taka hana við í viðgerðina, telur hon ikki við. Myndin skal tematiskt hanga saman við tekstinum.

Prógvtakarin lesur fyrst brotið á 70 orð upp, og síðan kann prógvhoyrari seta spurningar á føroyskum til bæði málslig og/ella innihaldslig viðurskifti, sum vísa, um prógvtakarin hevur skilt kjarnan í tekstinum, og fatan prógvtakarns av málbygnaðinum. Tað kann t.d. vera spurningar um, hvussu onkur týðandi setningur verður týddur, ella hvussu ein setningur verður greinaður mállæruliga.

Í framløguni skal prógvtakarin viðgera tekstin sambært tí, hann/hon verður biðin um í prógvtøkuspurninginum. Umframt tekstin skal prógvtøkuspurningurin hava 2-3 leiðbeinandi spurningar til tekstin. Sí dømi niðanfyri.

Dømi
Aufgabe:

=> Bereite eine Präsentation des Textes vor

- Fasse den Text kurz zusammen
- Kommentiere mindestens zwei Textstellen
- Vergleiche den Text mit anderen Texten zu dem Thema X

=> Zusätzlich kannst du relevante Texte aus anderen Themenbereichen miteinbeziehen

Onnur dømi um undirspurningar:

- Kommentiere Zeile X-X: „XXX“ - - - - - - -
- Kommentiere eventuell einzelne Textstellen
- Charakterisiere X
- Welchen Eindruck hast du von X?
- Beschreibe X
- Analysiere …
- Interpretiere …
- Erkläre, wie/warum

Í framløguni skal prógvtakarin taka uppí lisnað evnið, sum teksturin er knýttur at. Í samrøðuni millum prógvtakaran og prógvhoyraran verður nærri komið inn á ymiskt í tekstinum og tilknýtið til lisna evnið.

Leiðbeinandi tíðarbýti til munnligu prógvtøkuna:
Tekstur:
Upplestur og spurningar á føroyskum: 5-8 minuttir
Framløga: 8-10 minuttir

Samrøða: 8-10 minuttir

Í alt: uml. 25 minuttir

Undirvísarin velur prógvtøkutilfarið og sendir prógvdómara tað til góðkenningar í seinasta lagi 5 yrkadagar fyri prógvtøkuna. Prógvtøkuspurningarnir verða trektir við lutakasti, tá ið prógvtøkan byrjar. Í minsta lagi ein prógvtøkuspurningur skal vera til hvørt av evnunum, sum eru partur av prógvtøkugrundarlagnum. Hvør prógvtakari skal hava minst 4 prógvtøkuspurningar at velja í.

Hjálparmiðlar: At allir hjálparmiðlar eru loyvdir vil siga, at prógvtakararnir kunnu hava alt undirvísingartilfar við sær inn í fyrireikingina, t.e. egnar notur, egnar uppgávur, lisnar tekstir, ástøðiligar frymlar, orðalistar, lærubøkur, mállærubøkur og orðabøkur. Loyvt er ikki at nýta umsetingarforrit, og avrikið skal vera sjálvstøðugt, so tí er vitlíki heldur ikki loyvt at nýta. Prógvtakarunum er ikki loyvt at samskifta við umheimin í fyrireikingini.

Undir prógvhoyringini kann prógvtakarin einans nýta notur, sum hann/hon hevur gjørt í fyrireikingini.

Skilagott er, at næmingarnir í undirvísingini verða kunnaðir um dømi um prógtøkutekstir, so at tey kenna útsjónd, longd og torleikastigið á prógtøkutekstum, og at tey í undirvísingini fáa høvi at arbeiða undir líknandi treytum sum til prógtøku. Soleiðis fáa tey eina fatan av, hvat tey megna innan fyri givnu tíðaravmarkingar.

3.4.1. Dømingargrundarlag – munnlig prógtøka

Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun prógtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Prógtakarin skal við støði í fakligari tilgongd sýna evni til sjálvstøðugt á týskum at leggja fram og viðgera tilfar við støði í einum prógtøkuspurningi. Prógtakarin skal vísa, at hann/hon dugir at taka fram týðandi tættir í tilfarinum og seta teir í samband við tættir í undirvísingini. Evnini at samskifta á týskum verða vektað hægst. Samanhangandi málburður á týskum er meira umráðandi enn lýtaloysi í smálutum.

Givið verður eitt prógtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki prógtakarans.

Týskt A - framhaldsmál

Tá ið prógtøkan verður mett, er týdningarmikið at leggja dent á tað, sum prógtakarin dugir, og ikki einans á villur og manglar. Heildarmetingin hevur størri týdning enn einstakir smálutir.

Dentur verður serliga lagdur á, at prógtakarin:

- lesur við góðari og skilligari úttalu
- vísir kunnleika til týskan málbygnað
- skilir yvirskipaðu heildina í tekstinum
- nýtir viðkomandi greiningaramboð
- sjálvstøðugt megnar at skipa framløguna
- setir tekstin í frásjón til lisin evni.

3.4.2. Prógtalslýsing – munnlig prógtøka

Prógtal	**Heiti**	**Lýsing**
12	Framúr gott	Prógtakarin leggur fram og samtalar á einum greiðum, fjølbroyttum og málsliga røttum máli. Framløgan er sjálvstøðug, væl løgd til rættis, og vísir sera gott innlit í viðgjørda evnið. Bæði í framløgu og samrøðu hevur prógtakarin eitt gott alment og fjølbroytt orðfeingi. Prógtakarin hevur skilt tekstin og evnið væl, hann/hon dregur inn viðkomandi tættir í viðgerðina og setur evnið í størri høpi. Samrøðan gongur væl, prógtakarin fótar sær lættliga í samrøðuni, er greiður og

		sjálvstøðugur. Upplesturin er flótandi, úttalan sera góð og skillig, og prógvtakarin vísir breiða málfatan.
7	Gott	Prógvtakarin leggur fram og samtalar á einum greiðum máli, sum tó er minni flótandi og hevur ávís lýti málsliga. Framløgan er samanhangandi og nøkulunda væl løgd til rættis og vísir heilt gott innlit í viðgjørda evnið, men er í minni mun sjálvstøðug. Bæði í framløgu og samrøðu hevur prógvtakarin eitt rímiliga alment og fjølbroytt orðfeingi. Prógvtakarin hevur í stóran mun skilt tekst og evni og dregur í ávísan mun viðkomandi tættir inn í viðgerðina. Upplesturin er rímiliga flótandi, tó ikki heilt neyvur og við einstøkum villum, úttalan er góð og skillig, og prógvtakarin vísir góða málfatan.
02	Nøktandi	Prógvtakarin leggur fram og samrøður á einum skilligum, men ikki serliga greiðum máli, og rættiliga nógvar málsligar villur koma fyri. Framløgan er heldur trilvandi og hongur ikki væl saman. Prógvtakarin vísir innlit í viðgjørda evnið, men megnar bert í lítlan mun at draga tað inn í framløguna. Samrøðan um evnið gongur trekt, men ber til. Upplesturin er óneyvur, og prógvtakarin vísir málfatan í skerdan mun.

4. Ársætlan og undirvísingargongdir

Tíðliga í skúlaárinum skal ársætlanin fyri lærugreinina vera tøk. Ársætlanin er eitt yvirskipað skjal við yvirliti yvir ráðlagdar undirvísingargongdir fyri skúlaárið.

Lærarin skal so hvørt í undirvísingini gera ítøkiligar lýsingar av hildnum undirvísingargongdum. Nakað fyri skúlaárslok skulu undirvísingargongdirnar fyri farna skúlaár skrivast lidnar. Endamálið við undirvísingargongdunum er at skjalfesta, at undirvísingin hevur lokið krøvini í galdandi námsætlanum. Undirvísingargongdirnar eru eisini støði undir munnligu prógvtøkuni og verða latnar prógvdómara.

Víst verður til skjølini: “Leistur – lestrarætlan fyri lærugrein” og “Leistur – undirvísingargongd”.